## Rusk í skúlanum

Landsmiðstøðin og Tórshavnar kommuna geva nú út undirvísingartilfar um umhvørvi við heitinum ”Rusk í skúlanum”. Í tí sambandi verður framløga í Landsmiðstøðini á Hoyvíksvegi 72 hósdagin kl. 13.30. Har fer Petur Ove Petersen á Landsmiðstøðini at greiða frá undirvísingartilfarinum, og Jógvan á Lakjuni, Elin Lindenskov, Jenny Lydersen, Bergmann Finnson og Petur Simonsen fara at siga nøkur orð um evnið.

# enda við “JA”

støðan verður ikki heilt tann sama, sum í fjør. Sosialurin hevur ringt til alla tingmanningina og spurt, hvørjum teir fara at atkvøða fyri, tá málið einaferð kemur so langt, og úrslitið er, at 14 siga seg fara at atkvøða fyri uppskotinum, 12 siga seg fara atkvøða ímóti uppskotinum og 6 vilja ikki siga hvat teir fara at atkvøða. Var hetta úrslitið til endaligu atkvøðugreiðsluna, so hevði uppskotið komið ígjøgnum, men tað er ikki veruleikin. Nakrar broytingar eru tó greiðar:

Tveir tinglimir, sum atkvøddu ímóti seinast, fara at atkvøða fyri uppskotinum hesaferð. Tað eru Johan Dahl og Hergeir Nielsen, sum hava broytt støðu og nú fara at atkvøða fyri uppskotinum.

Av teimum, sum atkvøddu fyri uppskotinum seinast, er ongin, sum hevur broytt meining. Við øðrum ber til at staðfesta, at bólkurin, sum ætlar at atkvøða fyri uppskotinum, er vaksin við tveimum tinglimum, meðan tey, sum vóru ímóti uppskotinum eru vorðin tvey færri.

### 6 svara ikki

Haraftrat kemur so tann sannroynd, at tað eru heili seks tinglimir, sum ikki vilja siga, um teir fara at atkvøða fyri ella ímóti uppskotinum. Hesir seks atkvøddu allir ímóti seinast, men tá Sosialurin ringdi til teir, vildu teir ikki siga hvat teir fóru at atkvøða. Ymsar kunnu orsøkirnar vera til tess. Olav Enomoto segði, tá hann varð spurdur, at hetta var at kóka gamlan greyt upp aftur og tímdi ikki at svara. Hetta er møguliga eitt tekin um, at maðurin ikki hevur broytt støðu í mun til seinast.

Marjus Dam vil heldur ikki svara uppá, hvat hann fer at atkvøða. Tá Sosialurin tosaði Marjus gav hann tó greiðar ábendingar um, at sum støðan var nú, so var hann ikki serliga positivur mótvegis uppskotinum.

Hvørki Sverre Midjord ella Henrik Old vildu siga hvar teirra atkvøða fór at liggja. Men Sosialurin skilur á keldum í Javnaðarflokkinum, at meðan Sverre Midjord helst fer at atkvøða ímóti uppskotinum, so er okkurt sum bendir á, at Henrik Old kann hava skift støðu og hellir fyri uppskotinum.

Edmund Joensen og Páll á Reynatúgvu hildu síni kort tætt at kroppinum, og góvu ikki nakrar ábendingar um, hvør teirra avgerð verður.

### Edmund og Páll avgerandi

Úr hesum ber ikki til at staðfesta nakað um endaliga úrslitið. Men út frá hesum ber í hvussu so er til at siga so mikið sum, at tað ikki er óhugsandi at uppskotið kemur ígjøgnum.

Sosialurin skilir, at greinin hjá Halgir Winther Poulsen í blaðnum seinasta fríggjadag um mannarættindasáttmálan, hevur fingið nakrar tinglimir at umhugsa støðuna um, hvar teirra atkvøða skal setast.

Av øllum teimum, sum Sosialurin hevur tosað við, er støðan Páll á Reynatúgvu og Edmund Joensen tær einastu, sum vit als ikki kenna til, men hugvekjandi er tað, at avgerandi atkvøðan møguliga liggur í hondunum á løgtingsformanninum.

Hvussu er og ikki, so verður tað ómetaliga tætt og hóast okkurt bendir á, at uppskotið kann koma í gjøgnum, so siga fyribils metingar frá tingmonnum, sum Sosialurin hevur tosað við, at 17 tinglimir fara at atkvøða í móti uppskotinum og 15 fara at atkvøða fyri.

# Samkynd: Anfinn Kallsberg klárur við nýggjari loysn

**Formaður Fólkaflokksins er sannførdur um, at verða tey samkyndu nevnd í revsilógini, verður tað næsta, at samkynd eisini skulu hava rætt til skrásett parlag og rætt til viðgerð fyri barnloysi. Tí vil hann hava eina aðra loysn á málinum**

SAMKYND Í FØROYUM

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*- Tann, sum trýr, at hann kann leypa út av á fimtu hædd og inn aftur á fjórðu hædd hædd, fer skeivur. Vilja vit tryggja tey samkyndu, kann tað gerast nógv effektivari og einfaldari, heldur Anfinn Kallsberg, formaður fólkafloksins*

- Tað er rættiliga bláoygt at trúgva, at alt endar her.

Anfinn Kallsberg, løgtingsmaður og formaður Fólkafloksins, er sannførdur um, at tað býr nógv meir undir uppskotinum um at verja samkynd enn vit kanska geva okkum far um.

- Orsøkin til at hetta uppskotið er ikki bara at verja tey samkyndu ímóti happing og forfylging, tí tað er ongin ivi í mínari verð um, at tað býr nógv annað undir.

Formaður fólkafloksins er sostatt sannførdur um, at verður hetta uppskotið samtykt, er hetta bara byrjanin til at samkynd eisini skulu hava nógv fleiri og víðkað rættindi í Føroyum.

- Tískil verður tað næsta, at samkynd eisini skulu hava rættindi til at ganga saman í skrásett parlag, til at ættleiða børn og til at fáa viðgerð fyri barnloysi.

Hann sigur, at fjalda dagsskráin hjá Finni Helmsdal og Annitu á Fríðriksmørk verður best lýst við einum orðafelli hjá einum politikara í tjóðveldisflokkinum.

Hann vil ikki nevna politikaran, men tjóðveldismaðurin segði, at tað ber altso ikki til at leypa útav á fimtu hædd og innaftur á fjórðu hædd. Ert tú fyrst lopin útav, er bara ein vegur og tað er heilt niður.

Anfinn Kallsberg heldur, at hetta er ein ógvuliga beinrakin lýsing av støðuni og tað metir hann eisini, at viðgerðin í tinginum fer at prógva.

### Mannarættindasáttmálin órógvar

Annfinn Kallsberg atkvøddi ímóti seinast, málið var til viðgerðar og sum hann hevur ikki broytt støðu sum so.

Hinvegin ásannar hann, at tað órógvar hann almikið, at verða tey samkyndu ikki betri vard, kann hetta tulkast sum brot á mannarættindasáttmálan.

Og tað er álvarsmál. Men fyri at byrgja upp fyri tí, fer formaður fólkafloksins at seta fram eitt heilt annað uppskot í Løgtinginum. Og hann sigur, at hetta er eitt uppskot sum tryggjar, at ongin kann skuldseta okkum fyri at bróta mannarættindini, hóast samkynd ikki beinleiðis verða nevnd.

- Tað kann lættliga gerast við at broyta revsilógina so at grein 14 í mannarættindasáttmálanum verður beinleiðis sett í revsilógini.

- Og tað verður mítt uppskot í Løgtinginum, staðfestir Anfinn Kallsberg.

Grein 14 í mannarættindadómstólinum sigur á donskum, at rættindi og frælsi hjá fólku skulu tryggjast ”……unden forskel på grund af køn, race, farve, sprog, religion, politisk eller anden overbevisning, national eller social oprindelse, tilhørsforhold til et nationalt mindretal, formueforhold, fødsel eller ethvert andet forhold”

- Seta vit hesa greinina í mannarættindasáttmálanum beinleiðis í revsilógina, eru rættindini hjá samkyndum, eins og øllum øðrum, tryggja, uttan at ein tann einasti bólkur verður beinleiðis nevndur.

Formaður fólkafloksins sigur, at verður hetta sett í revsilógina, kann ongin skuldseta okkum fyri at broyta mannarættindasáttmálan.

Tað er eisini greitt, at Anfinn Kallsberg verður neyvan einasti fólkafloksmaður við hesum uppskotinum, tí eisini aðrir hava róð á sama borðið, eitt nú Jørgen Niclasen, formaður fyri tingmanningina hjá flokkinum og Heðin Zachariasen, tingmaður.

### Fara uttan iva at muta ímóti

Men Anfinn Kallsberg sigur, at politisku mótstøðumenn hansara í Løgtinginum, fara uttan iva at muta ímóti við teirri grundgeving, at tað ber ikki til at broyta eina danska lóg so nógv.

- Tað gevur okkum tveir møguleikar. Antin kunnu vit samtykkja tað kortini tí tað verður torført hjá dønum at muta ímóti, at ein grein í sjálvum mannarættindasáttmálanum verður sett beinleiðis í revsilógina. Gera teir tað, mugu teir eisini greiða frá, hvussu teir kunnu hava eina lóg, sum er í andsøgn við altjóða mannarættindini.

- Hin møguleikin er rætt og slætt at yvirtaka revsilógina, tí tað kunnu vit gera uttan hóvasták við yvirtøkulógini í hondini, sigur formaður fólkafloksins.

Hann metir, at verður málið loyst soleiðis, sum hann skjýtur upp, er hetta ein nógv betri vernd av samkyndum.

- Tað er ógvuliga ivingarsamt, hvør trygd er í tí, bara at fáa tey samkyndu nevnd í revsilógini. Tað hava tey verið í Danmark í fleiri ár, men mær vitandi er ongin enn dømdur fyri at gera seg inn á tey. Okkurt sakarmál hevur verið, men tað er endað við fríðøming, so eg ivist í, hetta fer at føra betri trygd við sær, sigur Anfinn Kallsberg.